*Tíðindaskriv 23. januar 2017*

# EduArctic styrkir náttúruvísindaligar førleikar hjá næmingum

EduArctic er ein ES-verkætlan, sum bjóðar skúlum inn í vísindaliga umhvørvið við hugtakandi søgum frá arktiskari gransking í m.a. Føroyum, Svalbard, Íslandi og Noreg. Verkætlanin vendir sær serliga til ung og lærarar teirra í framhaldsdeild og miðnámsskúlum við fyrilestrum, kappingum, kanningum og øðrum.

Jarðfeingi og samstarvspartar í Føroyum luttaka saman við stovnum í Póllandi, Fraklandi, Íslandi og Noreg í EduArctic-verkætlanini, sum heldur fram til 2018.

Úrslitini frá PISA-kanningunum, sum vórðu almannakunngjørd í desember, vístu, at stórur tørvur er á fjøltáttaðum undirvísingartilfari til skúlar innan náttúruvísindalig og tøknilig evni. Tað er nakað av hesum, sum EduArctic-verkætlanin bjóðar.

**EduArctic-verkætlanin er samansett av fimm eindum:**

- **Webinar**-fyrilestrar um náttúruvísindi og arktiska gransking.
- **Polarpedia**, sum lýsir vísindalig hugtøk og ymiskt undirvísingartilfar á fimm ymiskum málum.
- **Arktisk kapping** fyri skúlanæmingar í øllum Evropa, har vinningurin er ein arktisk kanningarferð.
- **Náttúrukanningar** í umhvørvinum kring skúlan.
- **Læraraskeið**.

Í hesum døgum byrja undirvísingartilboðini til skúlar í Føroyum og kring alt Evropa. Skráin við m.a. kapping og fyrilestrum er at síggja á portalinum hjá verkætlanini: Edu-arctic.eu.

Lærarar í fólkaskúlum og miðnámsskúlum hava møguleika at tekna seg og gera gagn av ókeypis tilboðum, sum verkætlanin bjóðar.

Fylg okkum (eduarctic) á: twitter Linkedin

**Fleiri upplýsingar um EduArctic-verkætlanina:**

| | |
|---|---|
| Portalur: | edu-arctic.eu |
| Videofilmur við føroyskari rødd: | https://www.youtube.com/watch?v=MPLNHfLJksI |
| Videofilmur við enskari rødd: | https://www.youtube.com/watch?v=TZt-aplCA4c&t=25s |
| Føroyskur faldari: | http://edu-arctic.eu/images/promotional/Brochure_EDUArctic_Faroese.pdf |
| Lærarar kunnu tekna seg: | http://edu-arctic.eu/program/teachers/register |
| Tíðindabræv til øll áhugað: | http://edu-arctic.eu/program/subscriptions/new |



Grant agreement No 710240.

JARÐFEINGI
Faroese Geological Survey

www.edu-arctic.eu